Fylgiskjal 2

# Lendis- og skipanarætlan fyri sambýlið í Miðvági



# Innleiðing

Skipanar- og lendisætlanin umfatar tvey grundøkið í Miðvági. Ætlanin er at byggja eitt nýtt sambýli á matr. nr. 149n, Miðvági og at umvæla verandi bygningar á matr. nr. 341, Miðvágur, Leitisvegur 70.

Innleiðandi fundur við byggiharra við kunning og spurningum varð hildin 14/7-25, eftir hetta fór arbeiði í gongd og innlating av skipanar- og lendisætlanini er 11/9-25.

Í samband við hesa verkætlan, skulu atlit takast til hvussu hesi viðurskifti verða skipað á økjunum: parkering, atkoma, útiøki, gøtur, ferðsla av fólki á økinum og annars at skapa eitt hugnaligt og heimligt bústaðargrannalag.

Skipanar- og lendisætlanin inniheldur eina frágreiðing, diagrammir og støðumynd.



*Myndin vísir dømi uppá verandi vøkstur á matrikklunum. Har vekstur m.a. Reyðakkuleya, Svínasólja, Leggsýra og vanlig Mýrisólja. Hesar bjóða grasinum av og seta lit á bøin.*



*Útsýnið frá seyðahúsinum út á Miðvág.*




*Diagram 1: Verandi umstøður, tá millum bygningurin er tikin niður.*

# Verandi umstøður

Samlaða verkætlanarøkið er 8104 fermetrar til støddar og fevnir um Leitisveg 70, matr.nr. 341, Miðvágur og Birtulíð, matr.nr. 149n, Miðvágur. Talan er um tvey økir, ið liggja lið um lið. Á Leitisvegi 70 skulu verandi bygningar dagførast og umvælast meðan byggjast skal eitt nýtt sambýli á Birtulíð. Felagshentleikar verða á Leitisvegi 70. Millumbygningurin á Leitisvegi 70 verður tikin niður.

Hæddin á stykkinum liggur millum kotu 46 og kotu 50 sambært kortal.fo. Hetta vil siga at hæddarmunurin á stykkinum er áleið 4 metrar býttur á áleið 60 metrar, suður – norð, sambært hæddarkurvum á kortal.fo. Lendið er turt, tó í støðum er vátt. Á matrikkul 149n, Birtulíð, í eystara partinum av matrikklinum er lendi vát og har er vøkstur fram við veitunum.



*Diagram 2: Nýggju byggifeltini og verandi bygningar.*

# Byggifelt

Byggifeltið í Birtulíð er staðsett í tráð við landslagið og í forhold til verandi bygningar. Málið er at byggja tætt uppat verandi bygningum soleiðis, at farðleiðin frá køkinum í verkstaðsbygninginum verður góð at ferðast eftir. Vestanfyri bygningarnar eru goymlsa og skúrur.

Eisini er umráðandi, at bygningurin leggur seg tætt uppá verandi vegi fyri at minka um vegastrekkið, soleiðs at búfólkið fær meira lendi til møgulig uppihaldsstøð. Umráðandi er at bygningurin hevur eina frástøðu frá verandi íbúðum fyri at skapa privatlív, og samstundis at tað gert møguligt at hava eitt suðurvent uppihaldsstað.

Byggifeltið leggur eisini upp til eitt vestur- og eysturvent tún, sum skal steinsetast og kunna brúkast av fólki við rørslutarni, so at búðfólki kann njóta morgun- og kvøldarsólina. Staðsetingin av byggifeltinum ger tað møguligt at tað fría og opna landslagið eystureftir verður órørt av byggingini.



*Diagram 3: Atkoma til bygningarnar.*



*Diagram 4: Parkeringsumstøðurnar á økjunum.*

# Atkoma

Byggifeltið og parkeringsplássið við Birtulíð er lagt so tætt uppá verandi veg, fyri fáa so lítið av bygdnum vegi inná matrikkli sum gjørligt, fyri at fáa eina einfalda atkomu til bygningin. Møguligt er hjá einum bili/minibussi at koma heilt innat bygninginum, um neyðugt er fyri hesum. Høvuðsatkoman til verkstaðsbygningin verður í vestara síðu, har er eisini møguleiki at hava vøruinnkoyring.

Íbúðinar við Leitisveg 70 hava sína egnu inngongd og terrassu. Inngongdin til verkstaðbygningin liggur tætt við íbúðinar, so tað er skjótt og lætt at ferðast ímillum eindinar. Eisini er útigoymslan og ruskskýlið staðsett vestarumegin verkstaðsbygningin. Beinleiðis atgongd er frá verkstaðsbygninginum og út til suðurvenda útiøkið.

Samband er ímillum verkstaðsbygningin og Birtulíð eftir eini gøtu, sum kann innilokast. Høvuðsinngongdin til Birtulíð vendur vestureftir og hevur beinleiðis atgongd til parkeringsplássið og vesturvenda túnið. Eisini er útigoymslan og ruskskýlið staðsett millum bygningin og parkeringsplássið, soleiðis at tað er lætt at nýta. Tað ber eisini til at koma út eystanfyri bygningin, so at búðfólkið fær beinleiðis atgongd til túnið og opna landslagið.

# Parkeringsumstøður

Tvey parkeringsøkir eru við sambýlini, annað við Birtulíð og hitt við Leitisveg.

Við Birtulíð er parkeringsøkið ramma inn av vetrargrønum runnum, sum skulu verja íbúðinar og uppihaldsøkini fyri ljóslygtunum og ferðsluni. Tó er møguleiki hjá rørslutarnaðum at koyra heilt inn til bygningin við av og á setan. Pláss er fyri 43 parkeringsplássum, parkeringsbásarnir eru teknaðir eyka breiðir, 3 metrer, fyri at tað skal vera lættari at koma inn og út úr bilinum. Fýra almenn parkeringspláss eru vestanfyri parkeringsplássið.

Parkeringsøkið við Leitisveg er staðsett sunnanfyri bygningarnar, so at tað kann vera friðaligt og eitt bilafrítt økið við íbúðinar og millum bygningarnar. Tó er tað møguligt at gera av og á setan við íbúðinar og vøruinnkoyringin er vestanfyri verkstaðsbygningin. Parkeringsplássini hava grasarmering og vegurin er asfalteraður.



*Diagram 5: Ferðsla av fólki millum bygningarnar*



*Diagram 6: Vøkstur á staðnum og kring bygningarnar*

# Ferðsla av fólki

Bygningarnar eru staðsettir hvør í sær, men knýttir saman við eini farleið, sum kann vera ein opin ella inniloka farðleið, sum lættir um innanhýsis ferðsluna av búðfólki og starvfólkum. Hetta ger at hvør bygningur kann virka sum sín egna eind, men at tað er lætt ferðast í millum eindinar. Byggifeltið leggur upp til eina felags inngongd við Birtulíð, sum síðani býtir bygningin upp í tvær eindir. Millum parkeringsøkið við Birtulíð og íbúðinar við Leitisveg er ein trappa, sum ger tað skjótt at ferðast í millum parkeringsplássini uttan bil.

# Vøkstur

Á økinum er plantað við blandaðum trøum og runnum. Við parkeringsplássini skal plantast við blandaðum veturgrønum runnum, soleiðis at parkeringsplássini koma at vera minni sjónlig. Eisini er planta við terrassurnar, so at búðfólki kann fáa privatlív og seta sín egna dám á umstøðurnar. Norðanfyri og vestanfyri bygningarnar á kommuniala økinum skal plantast við gøturnar, so at tað verður skapað lívd og minni innlit á sjálvt sambýlið. Sum heild skal tað plantast út frá prospect/refuge prinsippinum, sum snýr seg um at búðfólki skal verjast fyri innliti, men varðveita útblikkið til nærumhvørvi.

Meginreglan prospect-refuge sipar til náttúrliga lívmenningina hjá menniskjanum – '*Vit kenna okkum trygg í umhvørvum har, sum vit kunnu síggja hugsandi vandar fyri framman og samstundis hava møguleika at goyma okkum.*' Hendan meginreglan verður brúkt og planta eftir, tá ein ynskir at skapa ró, tryggleika og samstundis eina estetiska loysn.

Proscpect (útsýni)
Skapa opin økir við lágum vøkstri og við úsýnisstøðum. Møguleika at síggja yvir landslagið, fyri at hyggja seg um og merkja at man er í kontrol. Dømi um hetta kann vera opin støð við grasi, lágum vøkstri, opnum gøtum og útsýni yvir sjógvin.

Refuge (skjól)
Skapa økir við hægri og tættari vøkstri. Hetta gevur eina kenslu av tryggleika, skjóli og avbyrging frá umhvørvinum. Dømi um hetta kann vera trø planta í bólkum, runnar sum girðing og klívplantur.
*(Appleton, J. (1975). The experience of landscape. Wiley)*



*Diagram 7: Gøtusambandið millum bygningarnar og nærumhvørvi*

# Gøtur

Runt um bygningarnar er gøtusamband, soleiðis at man kann ganga sær ein túr og koma til og frá ymisku bygningunum á ein skynsaman hátt.

Frá køkinum og niðan í Birtulíð er løgd ein gøta, sum skal roknast sum ein farleið til praktisk viðurskiftir, so sum matflutnað og starvfólkaleið og hjá búðfólkinum at brúka. Hendan gøtan kann innilokast so at starv- og búfólk kunnu ganga turr í millum bygningarnar. Ein smøl gøta løgd oman til vátliga lendi eystanfyri, so at tað er møguligt at ganga sær ein túr og sansa blómurnarnar um summarið. Ein lítil brúgv er løgd yvir um veitina.

Gøturnar eru staðsettar so at tað er møguligt at ganga sær ein túr runt um bygningarnar, oman til fríøkið sunnast á Leitisvegi, FK, og niðan aftur til Birtulíð. Henda gøtan kann vera ein motivation til búfólki til at ganga sær ein túr og fáa fríska luft og t.d. keypa inn.



*Diagram 8: Uppihaldsstøð*

# Uppihaldsstøð

Á diagramminum til vinstru síggjast uppihaldsstøðini markeraði við reyðum.
Hvør íbúð hevur sína egna terrassu, sum ein sjálvur kann ráða yvir. Umframt hetta eru felagsøkir til uppihald uttandura. Felagsøkini hava hvør sín eginleika við tað at tey venda, suður, vestur, eystur og norðeftir, tað gevur búðfólkunum, starvfólkunum og avvarandi møguleika at kunna fara út líkamikið tíðina á degnum og í mun til vindættina. Við eysturvenda túnið er pláss fyri at gera eitt nú eina reiggju, so tá búðfólkið fær vitjan av børnum, so er møguleiki at fara út ein túr.

Eisini er eitt størri suðurvent uppihaldstað við verkstaðsbygningin. Sunnast á økinum við Leitisveg er gjørt eitt størri fríøkið, við trøum, runnum og gøtum. Hetta skal blíva til eina lund til búðfólkið og starvsfólkini, sum skulu kunna uppihalda sær og njóta náttúruna í einum tryggum, grønum og estetiskum fríøkið.



*Diagram 9: Samband við nærumhvørvið*

# Samband við nærumhvørvið

Til vinstru á diagramminum sæst hvussu gøturnar eru staðsetar fyri at kunna hava eitt samband við nærumhvørvið.
Fyri at knýta stovnarnar nærri at bygdini og hentleikum annars, er neyðugt við einum góðum gøtusambandi og einum visuellum sambandi, sum kann eggja búðfólkinum at koma meira út og gerast forvitin. Hetta er m.a. gjørt við at gøturnar, sum hoyra til sambýlini, eru knýttar at teimum kommunalu gøtunum og íbundnar oman til handilin í nærumhvørvinum.



*Diagram 10: Framtíðar møguleikar*

# Framtíðar møguleikar

Sunnast út ímóti landsvegnum er møguleiki fyri at víðka um virksemi og byggja ein bygning afturat, sum kann knýtast at verandi bygningum við at leingja um yvirdekkaðu gøtuna, sum knýtir saman allar bygningarnar. Sí reyðu prikkastrikuna.





Støðumynd 1:750